Viðmerking:

## Pensiónsgølan (1): Setið gomlu skipan aftur í gildi

Nær fara løgmaður og samgongan at leggja frá sær orsaka av vánaligum arbeiðslagi og stevi? Er neyðugt við fleiri gølum afturat?

Tað er so ikki neyðugt at minka pensiónirnar fyrrenn fullveldi gerst veruleiki - og tá skal skerjast nógv meira hjá øllum, enn vit hava sæð nú.

**Trivnaðarnevndin visti at skeivleikar vóru!**
Tørvandi viðgerðin og manglandi upplýsingar til nýggju pensións og ásetingarlógina gav tað útslit ein kundi vænta: Eina gølu og niðurgerð, ið okkara pensionistar ikki hava uppiborið.

Teir skeivleikar, ið vóru í lógini vórðu ikki rættaðir av einum meiriluta av trivnaðarnevndini, men í skundi atkvøddir ígjøgnum.

Vit í trivnaðarnevndini vistu at tað vóru skeivleikar. Tess fleiri upplýsingar komu fram undir nevndarviðgerðini, tess fleiri skeivleikar komu til sjóndar.

Tí undraði tað almikið, at ein meiriluti í Trivnaðarnevndini ynskti at avgreiða og við lóg at staðfesta skeivleikarnar, ið pensionistar okkara skulu liva við framyvir.

Tað er ongin orsøk at seta í verk eina pensiónslóg, ið ikki røkkur til knøini á tí lóg, sum hevur verið galdandi til nú.

**Atkvøðuneyt?**
Við slíkum framferðarhátti undrar tað ikki, at landið er farið av knóranum einaferð, og at tað sama hendir einaferð enn. Her er snøgt sagt ov lítið skil á. Arbeiðshátturin er ikki „vit skulu gera tað betri“ men „Hvad fatter (Landstýrið) gør er altid det rigtige“ - eisini tá ið tað er skeivt. Soleiðis tykjast mangir samgongulimir at hugsa. Ella droyma teir bert um forkolaða fullveldi, sum flestu føroyingar tíbetur ynskja har pipari grør!

Tað tykist meira umráðandi at verja samgonguna enn at verja borgaran ein er valdur at umboða! Við hesum hugburði koma løgtingsmenn at verða „ikki hugsandi atkvøðuneyt“ - hvørki meira ella minni. Einstakir kalla tað politikk, kompromis og „at arbeiða við ábyrgd“

**Nevndararbeiði:**
Men eiga løgtingsmenn ikki at ávísa møguligar skeivleikar og veikleikar í løgtingsuppskotum og bøta um teir í nevnd? Er tað ikki tí at uppskot verða viðgjørd í nevnd? Eitt sera gott uppskot verður als ikki broytt undir nevndarviðgerðini. Men eitt vánaligt uppskot má broytast ella vera víst aftur til landsstýrismannin at rætta og bøta, um stórir skeivleikar eru. Hetta uppskotið átti ongantíð at verið lagt fram á Føroya løgting. Løgtingið átti í smb við nevndarviðgerðina at víst uppskotinum aftur til Landsstýrismannin tá allir skeivleikarnir komu fram. Men tað varð ikki gjørt í smb við hesa lóg - sjálvt um trivnaðarnevndin var vitandi um stórar skeivleikar.

Til dømis fekk trivnaðarnevndin at vita, at fleiri pensiónsupphæddir minkaðu. *Men onki var gjørt* av meirilutanum at bøta um hesi viðurskiftir.

Tað verðu gjørdur munur á um ein er giftur ella stakur, *men onki varð gjørt*

Tað verður gjørdur munur á um ein pensionistur er giftur við „pensionisti“ ella „ikki pensionisti“, *men onki varð gjørt*. Vit fingu at vita, at skatturin fór at eta hækkingarnar upp - *men onki varð gjørt* - stórt sæð - uttan at samtykkja uppskotið.

Hví rennur ein partur av Trivnaðarnevndini undan ábyrgd?

Tí undrar tað stórliga, at partar av meirilutanum í trivnaðarnevndini nú royna at vaska hendur og renna undan ábyrgd. Teir vistu nevniliga so sára væl hvat tað var teir royndu at fáa samtykt, og fingu samtykt!

Tvørturímóti má ein meiriluti í trivnaðarnevndini (íroknað Finnur Helmsdal og Páll á Reynatúgvu) og samgongan taka á sínar herðar konsekvensin av tí lóg teir sjálvir hava samtykt. Og onki við at renna undan ábyrgd, sum serliga Tjóðveldisflokkurin hevur verið kendur fyri. Vit hava nevniliga ábyrgdina fyri teimum lógum, ið verða samtyktar á Føroya Løgtingi, ikki Helena Dam á Neystabø, danir ella hini. Sjálvstýrisflokkurin hevur ongan lim í Trivnaðarnevndini og tí onga beinleiðis ávirkan á nevndararbeiði.

Tað er nevniliga púra greitt, at ein meiriluti á Føroya Løgtingi (samgongan Incl Tjóðveldisflokkurin) hevur samtykt hesa lóg, íð kemur at forpesta mongum pensionisti tilveruna.

Fyrrverandi pensiónslógin var gjøgnumhugsað. Tað tykist ikki vera soleiðis við tí nýggju.

**Vinarliga**
**Marjus Dam,**
**løgtingsmaður**




*Sum hendan myndin sýnir, hevur liturin á klæðunum nógv at týða, hvussu vit verða sædd myrkri. Jú ljósari klæði tú hevur, betri sæst tú. Best er tí at hava ljós vetrarklæði. Men hevur tú ikki tað, so mást tú nýta endurskin, tá ið tú skalt út at ganga í myrkri*

## Endurskinsátakið: »Vit síggjast«

Í hesum døgum skipa Føroya Sparikassi og Føroya Lívstrygging, saman við Ferðslutrygd, fyri einum rættuligum “fólkaátaki” at fáa fólk at nýta endurskin. Átakið verður kallað “Vit síggjast”. Endurskin eru gjørd til allar næmingarnar í fólkaskúlanum og harumframt til næmingarnar í miðnámsútbúgvingunum. Barnagarðar og dagsstovnar sum heild eru eisini íroknaðir. Tilsamans eru endurskin gjørd til fleiri enn 10.000 fólk. Tað eru tvey sløg av endurskini til hvønn: eitt sokallað “jogging”-endurskin, sum við karðalási verður fest um bein ella arm og so tvey smærri endurskin, sum verða límað á skógvahælin.

Tað er Føroya Sparikassi og Føroya Lívstrygging, sum rinda framleiðsluna av endurskinunum, meðan Ferðslutrygd stendur fyri at fáa endurskinini út til skúlarnar. Vónað verður, at skúlaleiðslurnar taka væl í móti og skipa fyri, at næmingarnir fáa endurskinini. Vónað verður eisini, at lærarar gera sítt til at fáa næmingarnir at nýta endurskinini - og tað serliga nú meðan myrkt og hávetur er. Um so er at endurskin resta í, er bara at seta seg í samband við Ferðslutrygd

**Við vón um góða undirtøku**
**Ráðið fyri Ferðslutrygd**
**— Føroya Sparikassi —**
**Føroya Lívstrygging**

## Spáfólkini fóru skeiv

*Mangir hava spádómarnir gjøgnum øldir verið um framtíðina, men flestu teirra hava verið skeivir*

JOHN JOHANNESSEN

Høvdu svartskygdastu spáfólkini rætt, skuldi heimurin verið gingin undir fyri fimm døgum síðani, tá árið skiftið frá 1999 til 2000. Men eins og so mangan, so fóru spáfólkini skeiv.

Fyri at styrkja fólk í trúnni á, at vit saktans klára at liva hetta árið og mong onnur út og fyri at vísa á, hvussu ofta spáfólk fara skeiv, kunnu vit taka aftur í nakrar spádómar, ið hava verið fullkomiliga skeivir.

1830: Hetta árið spáddi Dionysius Lardner, høvundurin av bók um dampmaskinuna, at tað fór at vera ómøguligt at ferðast við skjóttgangandi tokum, tí fólk fóru at doyggja av andaneyð. Í dag hava vit hópin av skjóttgangandi tokum kring allan heim.

1876: Hetta árið spáddi stjórin í telegraffyritøkuni, Western Union, at telefonin hevði so mikið fáar vansar, at tað aldri fór at bera til at fáa nakra serliga nyttu burturúr henni mannaættini at frama.

1903: Hetta árið segði presturin, Henry Adams, í einari av prædikum sínum, at um Guð vildi, at vit skuldu flúgva, hevði hann skapt okkum við veingjum. Tríggjar mánaðir seinni flugu synir hansara, Orwille og Wilbur, fyrsta motordrivna flogtúrin í Kitty Hawk í North Carolina.

1921: Undangongumaðurin innan útvarp, David Sarnoff, segði hetta árið, at tráðleysi tóinleikakassin als ongan handilsligan áhuga fór at hava millum fólk. Hann trúi ikki uppá, at nakar fór at hava áhuga fyri boðum, ið ikki vóru send til nakran ávísan persón.

1923: Hetta árið segði nobellvinnandi alisfrøðingurin, Robert Milliken, at menniskjan aldri fór at verða før fyri at vinna megi úr einum atomi.

1943: Hetta árið segði formaðurin fyri IMB, at hann metti marknað vera fyri umleið fimm teldum í øllum heiminum.

1946: Filmsmaðurin, Darryl Zanuck, segði hetta árið, at áhugin fyri sjónvarpi fór ikki at halda. Orsøkina segði hann vera, at fólk ikki fóru at tíma at sita og hyggja at einum trækassa hvørt kvøld.

1954: Jim Denny, leiðari av Grand Ole Olpry, segði hetta árið, tá hann segði Elvis Prestley úr starvi, at hann aldri fór at gerast nakað. Tí átti hann at fari aftur at koyrt lastbil.

1962: Hetta árið segði leiðarin av Decca Records, at Betles einki nyttaðu og vóru á veg út, tá hann avvísti teimum.

1977: Hetta árið segði stjórin fyri Digital Electronic Corporation, at tað als ikki fór at verða neyðugt hjá nøkrum einstaklingi at fáa sær teldu heima.

Hetta er alt prógv um, at torført er at spáa um framtíðina, og tí er ilt at siga, hvussu heimurin sær út um tíggju ár og uppaftur verri at siga, hvussu hann sær út um hundrað ár. Kanska vit tá flúgva í staðin fyri at koyra…




# Latið ikki børn tykkara sleppa heimlandinum

## Góð nýggjársgáva frá foreldrum til lesandi uttanlands...




## Ella vilt tú vita hvat hendir á pappírinum...




Tíðindablaðið
sosialurin

Tíðindablaðið
**sosialurin**
Box 76
110 Tórshavn

**ÓKEYPIS**
**Sosialurin rindar postgjaldið**
64

***Prísur fyri haldaragjald í Europa kr. 490,-/ársf.***
***Ella eitt internethald fyri bert kr. 240,-/ársf.***
*Ymiskir prísir fyri lond uttanfyri Europa, ring og hoyr nærri.*

**Móttakari:**

Navn:
Búst.:
Postnr., bygd/býur:

❑ **Haldaragjaldi í Europa** ❑ **Haldaragjaldi til Internetið**

**Um talan er um eitt internethald, skal e-mailadressan hjá móttakaranum skrivast her:** ____________

**Rokning skal sendast til:**

Navn:
Búst.:
Postnr., bygd/ býur:
Undirskrift:

**Send lepan til Tíðindablaðið Sosialin**